# Óbrúkiligt tilmæli um fiskiskap undir Føroyum

**– Fiskimenn eru eisini serfrøðingar á økinum og vit eiga at bíða eftir tilmælinum frá teimum, sigur Alfred Olsen, næstformaður í vinnunevndini**



*– Tað er heilt ofta hald í teimum metingum, sum sjómenn seta fram um fiskiskapin undir Føroyum og eg meti avgjørt at teir eru serfrøðingar, einsvæl og fiskifrøðingarnir eru,sigur Alfred Olsen, næstformaður í vinnunevndini*

TILMÆLI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Hetta letur seg slett ikki gera.

Dómurin hjá politikarunum yvir tilmælið frá ICES um fiskiskapin undir Føroyum, er tann vanligi. Alfred Olsen er næstformaður í vinnunvevndini hjá løgtinginum og hann er longu komin til ta niðurstøðu, at tilmælið frá ICES kann slett ikki brúkast.

Hann sigur, at nú eiga vit at bíða eftir tilmælinum hjá Fiskidaganevndini, sum er mannað við umboðum fyri vinnuna og eftir tilmælinum frá Fiskirannsóknarstovuni.

Men næstformaðurin í vinnunevndini dylir ikki fyri, at hann hevur mest álit á tilmælinum frá Fiskidaganevndini.

– Tilmælið frá Fiskirannsóknarstovuni plagar at líkjast tí frá ICES og tað fer tað helst aftur at gera í ár.

## Fiskimenn eisini serfrøðingar

Alfred Olsen sigur, at tað plagar at vera stórur munur á tilmælunum hjá fiskifrøðingunum og hjá Fiskidaganevndini.

– Fiskidaganevndin umboðar vinnuna. Sostatt umboðar Fiskidaganevndin teir, sum eru beinleiðis í vinnuni undir Føroyum. Tí eru tað teir, sum eisini hava fyrstuhonds vitanina um, tað sum rørist í sjónum.

Alfred Olsen sigur, at tað vísir seg heilt oftani, at tað er hald í teimum metingum, sum sjómenn seta fram.

– Eg meti avgjørt at sjómenn eru líka góðir serfrøðingar á økinum, sum fiskifrøðingarnir eru.

– Og tað hevur eisini hent seg, at vinnan hevur mælt til skerjingar. Vinnan hevur minst líka stóran áhuga sum øll onnur í, at fiskastovnarnir undir Føroyum verða røktir, tí teir eru lívsgrundarlagið undir vinnuni og hon hevur ongan áhugað í at taka lívsgrundarlagið undan sær sjálvari.

Hóast hann ásannar, at tilmælið frá Fiskirannsóknarstovuni er ógvuliga lítið brúkt seinastu árini, heldur hann, at tað er gagnligt at fáa teirra meting av støðuni eisini.

Og Alfred Olsen heldur als ikki, at vit skulu avskriva fiskifrøðingarnar, tí stovnsmetingarnar eru bara ein partur av teirra virksemi, tí teir fáast við so nógv annað eisini.

Annars heldur Alfred Olsen, at nøkur stig eru tikin til at minka veiðitrýstið.

– Fiskidagatalið minkaði 2% seinast og samsundis hava vit fingið eftirlit við fylgissveini, umframt at Føroya Banki varð friðaður í tveir mánaðir og at veiðitrýstið varð minkað 10%.

# Fiskiskapurin undir Føroyum má minkast munandi

**Fiskiskapurin eftir toski, hýsu og upsa undir Føroyum má minkast niður í helvt í summum førum, sigur ICES í nýggjasta tilmæli sínum**

TILMÆLIÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*ICES metir at veiðitrýstið á okkara høvuðsfiskasløg er ikki burðardygt og mælir tí til stórar skerjingar*

ICES hevur nú almannakunngjørt nýggjastu metingar sínar av stovnunum undir Føroyum. Samstundis hevur felagsskapurin gjørt síni tilmæli um fiskiskapin tey næstu árini.

Aftur í ár ávarar ICES um gongdina, tí mett verður at veiðitrýstið er alt ov stórt. Samstundis mælir felagsskapurin til stórar skerjingar í fiskiskapinum eftir okkara høvuðsfiskasløgum.

## Vit taka høvuðstáttin til tilmælinum:

### Toskur á Landgrunninum:

Stovnurin hevur verið væl fyri í fleiri ár, men er minkaður skjótt seinastu árini.

Stovnurin er í ár mettur at vera so lítil, at vandi er fyri, at hann ikki klárar at framleiða góða tilgongd. Veiðutrýstið er so stórt, at tað ikki er burðardygt.

Við tí veiðutrýsti, sum nú er, vil stovnurin næstu 2 árini koma niður á eitt støði sum er nær tí lægsta, vit vita um. Skal stovnurin koma fyri seg aftur upp á eitt ár, má øll beinleiðis toskaveiða halda uppat. Um hetta ikki kann verða gjørt eftir einum ári, eigur ein ætlan at gerast, har veiðitrýstið beinanvegin verður minkað eini 50% og síðani hildið har.

### Toskur á Føroyabanka

Stovnstøddin óviss og tað ber í løtuni ikki til neyvt at meta um stovnsstøddina. men yvirlitstrolingar benda á, at stovnurin hevur verið í minking síðani 2002 og tískil er metingin, at veiðutrýstið hesi árini hevur verið ov stórt. Fyri at stovnurin kann verða troyttur burðardygt, eigur royndin at minkast niður á árliga støðið í 1996-02.

Veiðitrýstið hevur verið hóskandi í fleiri ár, men vaks í 2003 og 2004 munandi og er eftir øllum at døma ikki burðardygt. Nýtta dagatalið á Bankanum var tvær ferðir so stórt í 2003 sum árini fyri, og hóast tað minkaði nakað aftur í 2004, er tað tó enn søguliga høgt. Stovnurin er sera viðbrekin yvir fyri ov stórari roynd, og dagatal í løtuni er helst ov stórt til at vera burðardygt.

Av tí tað er loyvt at fiska á Bankanum og á Landgrunninum á sama túri, er tað torført at fáa røtt tøl fyri veiðina fyri hvørt økið sær. Av tí at toskastovnarnir á Landgrunninum og á Føroyabanka eru ymiskir, er neyðugt, at veiðitølini ikki koma í bland, um neyvar stovnsmetingar og tilmæli fyri teir báðar toskastovnarnar skulu gerast. Uppgerðin av veiðitølum má tí fáast í rætt lag.

### Hýsa undir Føroyum.

Stovnurin er heilt væl fyri og fult førur fyri at framleiða góða tilgongd. Men veiðitrýstið er so stórt, at stovnurin er í vanda fyri ikki at verða troyttur burðardygt. Mælt verður til, at royndin verður minkað eini 23%, so at veiðutrýstið kemur niður á eitt hóskandi støði.

### Upsi undir Føroyum:

Stovnurin er í minking, og veiðitrýstið er alt ov stórt. Mælt verður til at minka royndina eini 40%. Stovnurin er í ár mettur at vera so lítil, at vandi er fyri, at hann ikki klárar at framleiða góða tilgongd. Veiðitrýstið er tí so stórt, at tað ikki er burðardygt.